# Óli, minnist tú, tá tú bjóðaði reiðarum at fiskimenn skuldu gjalda oljuna?

ANDRIAS BERGLÍÐ
sýsluformaður, Vágur

Nú um dagarnar hava Eyðun Jóhannesen og Óli Jacobsen aftur verið eftir Jan Højgaard. At tað júst eru hesi báðir, er ikki løgið, tí tier hugsa eftir mínum tykki meira um reiðaran enn um fiskimannin. Teir hava fleiri ferðir tikið avgerðir, sum aðrir nevndarlimir bara hava hoyrt um í pressuni.

Óli minnist tú, tá tú bjóðaði reiðarum, at fiskimenn skuldu gjalda oljuna fyri teir? Tá mótmælti eg, og tú tókst mær tað illa upp og gav mær av at vita. Nei, Óli, tað er neyvan nakar fakfelagsformaður í Føroyum, sum hevur tikið so nógvar avgerðir uttan um sína nevnd sum tú. Tú hevur ongantíð virt okkum í nevndini, og enn minni fiskimannin.

Eyðun Jóhannesen roynir helst at fáa tað at síggja út sum um Jan Højgaard ikki hevur viðgjørt málið um burturvísing av teimum, sum mynstraðu við Carlton, meðan mynstringarbann var. Men tað er ikki rætt, tí vit hava viðgjørt málið. Hetta er tó ikki felt niður í gerðabókina. Tá kom tað greitt fram, at tað var ein áheitan frá fleiri limum, at FF tók slík stig. Eg veit ikki um nakran, sum mótmælti.

Eg hevði vónað, at fiskimenn nú fingu frið fyri tær, Óli, men tú blívir við at leypa á fyri at fáa kurl á. Tað skuffar eisini, at tú bevíst gongur móti fiskimonnum. Tá vit høvdu eitt sakarmál um Arctic Viking vartú í part við reiðaranum sum vanligt.

Jan Højgaard arbeiðir fyri fiskimenn, tað hevur tú ongantíð gjørt.

# 64 røktarheimspláss í Tórshavnar kommunu

HALLA SAMUELSEN
Forkvinna í Sosialu nevnd



Tey manglandi røktaheimsplássini í Suðurstreymi hava fylt nógv hjá okkum býráðspolitikarum í samgonguni. Øll hava vit havt røktarheimspláss fremst í huga, og er tað ein samd samgonga, sum tekur undir við at byggja nýggja røktarheimið. Tað er eingin ivi um at bæði meirluti og minniluti standa aftanfyri hesa ætlan.

So man má siga tað, at eftir at hava bíðað eftir Landstýrðinum í langa tíð, eru vit sera glað og fegin um, at Landsstýrið nú hevur tikið avgerð um at játta stuðul til 64 røktarheimspláss í Tórshavnar kommunu.

Bráneyðugi tørvurin á røktarheimsplássum í Suðurstreymi er umleið 75, so tá Røktarheimið Yviri við Strond er liðugt við 64 plássum, so er tørvurin næstan nøktaður.

Ein arbeiðsbólkur varð fyrr í ár settur at fyrireika krøv til innihaldið í eini byggiskrá. Tá tað arbeiðið var liðugt, var innboðin licitatión um at gera eina neyva byggiskrá, sum skal vera grundarlag undir projektering. Albert Isfeldt og Gudmund S. Hansen, arkitektar, høvdu lægsta boð og fingu uppgávuna. Byggiskráin verður liðug síðst í november 2009. Tá verður ein byggineynd vald, og arbeiðið verður síðani boðið út. Eftir hesi ætlan, verður spakin settur í til Røktarheimið Yviri við Strond fyrst á vári 2010.

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ




miðlahúsið
í Vágsbotni

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!